

www.oljan.fo

**Jan Müller** 05 - 12 - 2011

# Danir hava nógv meiri olju enn hildið

Í fleiri ár hava danskir serfrøðingar sagt, at um 10 ár er eingin olja eftir í danska partinum av Norðsjónum, men nú sigur tann fremsti serfrøðingurin hjá dønum, Peter Helmer Steen, at Danmark verður oljuútflytaraland tey næstu 40 árini afturat. Peter Helmer Steen byggir sína meting á góðar vónir um, at meiri olja verður funnin bæði á sjógvi og á landi. Hann vísir á, at jalig kanningarúrslit í nýggjum jarðløgum, fleiri smá fund í økjum, sum feløgini vóru farin frá, og betri tøkni gera, at danir kunnu fáa nógv meiri olju upp úr verandi brunnum enn fyrr hildið. Metingin hjá Peter Helmer Steen víkir rættiliga nógv frá tí, sum Orkustýrið hevur sagt, men samstundis er tað ein sannroynd, at tey seinastu 20 árini hava metingarnar hjá Orkustýrinum víst seg at vera ov dapurtskygdar, skrivar Jyllands-Posturin. Tann nýggja metingin ljóðar væl í oyrunum á teimum, sum hava við danska ríkiskassan at gera, og yvirvísmaðurin Hans Jørgen Witta-Jacobsen ásannar eisini, at inntøkurnar úr Norðsjónum hava stóran týdning, tá hann og hansara felagar skulu meta um útlitini hjá danska búskapinum. Yvirvísmaðurin, sum eisini er professari á lærda háskúlanum í Keypmannahavn, sigur við Jyllands-Postin, at verður danska oljuævintýrið so nógv longri enn væntað, fær tað góða ávirkan á gjaldsjavnan, tí danir sleppa frá at taka fremmant gjaldoyra úr kassanum til at rinda fyri olju, sum teir sjálvir framleiða, vísir hann á. Danmark hevur verið olju- og gassútflytari síðani 1991.

